# ítróttur

Nr. 187 • leygardagur • 1. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


## Komandi dystir

### Fótbóltur

Formula-deildin

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 02.10 | TB-Skála | Lassin Isaksen |
| 02.10 | VB-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 02.10 | ÍF-HB | Eiler Rasmussen |
| 02.10 | GÍ-EB/S | Petur Reinert |
| 02.10 | B36-KÍ | Zarko Kovacevic |

2. deild

| | | |
|---|---|---|
| 01.10 | B36-Sumba | Jón K. Frederiksen |
| 01.10 | Royn-HB | Páll Augustinussen |
| 01.10 | AB-GÍ | Milan Cimburovic |
| 01.10 | FSV04-B71 | Regin Egholm |
| 01.10 | B68-LÍF | Ransin N. Djurhuus |

3. deild

| | | |
|---|---|---|
| 01.10 | B68-KÍ | Jón Sigurd Gleðisheygg |
| 01.10 | SÍ-HB | MB |
| 01.10 | Fram-Skála | Andrew Christiansen |
| 01.10 | EB/S-NSÍ | Eugen Voda |

### Hondbóltur

Sunset-kappingin

| | | |
|---|---|---|
| 01.10 | Søljan-StÍF | Dánjal Samuelsen & Heri Petersen |
| 01.10 | Kyndil-VÍF | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 01.10 | Tjaldur-Stjørnan | Rúni & Ragnar |
| 01.10 | VB-Neistin | Hallur Danielsen & Petur Skeel |

Atlantic Airways-kappingin

| | | |
|---|---|---|
| 30.09 | KÍF-Neistin | Rúni & Ragnar |
| 01.10 | Kyndil-VÍF | Kári Hansen & Dánjal Hansen |
| 01.10 | H71-StÍF | Kristian Joensen & Karsten Joensen |

# Víkingar og basalt-fláir

**Ein gloymdur klokkutími gjørdist meira ella minni beinleiðis orsøkin til, at fyrsti vinnarin av Formula-deildini fær eitt sera snotuligt steyp, har íblástur úr føroysku náttúruni og søguni eru hornasteinarnir undir sniðgevingini**

STEYP
*Jákup Mørk*



*Á heimasíðuni, www.clausbjerring.dk, ber til at síggja nýggja FM-steypið, eins og sagt verður eitt sindur frá arbeiðinum, sum liggur aftan fyri hetta*

Tá HB í fjør vann FM-heitið, vunnu teir samstundis steypið, sum Føroya Bjór hevði latið, til ognar.

Tað merkti so samstundis, at nýtt steyp skuldi finnast, og hetta er ikki nakað, sum bara verður gjørt uttan víðari. Fa. Eilif Arge, sum Magnus Arge rekur, hevur í mong ár havt uppgávurnar at lata skreyt av ymsum slag til Fótbóltssambandið, og tí heitti FSF aftur á teir um at átaka sær uppgávuna, nú nýtt steyp skuldi finnast.

- Eg kannaði sjálvandi fyrst, hvørjir møguleikar vóru, og tað endaði so við, at eg setti meg í samband við Claus Bjerring, sum er høgt virdur listamaður innan hetta økið, greiðir Magnus Arge frá.

- Tað vísti seg eisini, at hann alt fyri eitt var til reiðar at átaka sær uppgávuna, og eftir at hava tosað nakrar ferðir aftur og fram, gjørdi hann trý uppskot, sum vórðu send til FSF. Hesi vórðu væl móttikin, og avrátt var so, at Claus skuldi koma til Føroya á fund við FSF, og at tað tá skuldi takast støða til, hvør steypurin skuldi vera, sigur Magnus.

### Gloymska gav seinastu tekningina

Men søgan endar ikki bara her, tí mest sum á veg til fundin komu broytingar í ætlanirnar.

- Claus kom til Føroya ein mikudag, og teir báðar fyrstu dagarnar var hann her norðuri saman við dóttrini. Og tað høvið nýttu vit sjálvandi til at vísa honum nakað av Føroyum.

- Fríggjamorgunin skuldi leiðin so ganga til Havnar, men tá hann skuldi fáa sær morgunmat á Sjómansheiminum kom hann eftir, at klokkan als ikki var flutt. Tað vil siga, at hann stóð ferðabúgvin, ein tíma áðrenn morgunmatarborðið læt upp. Fyri at fáa tíðina at ganga, setti hann seg á kamarið at tekna eitt fjórða uppskot. Hetta var við týðiligum íblástri úr føroysku náttúruni, og tá vit á fundinum so skuldu taka støðu til uppskotini, fullu vit alt fyri eitt fyri hesum fjórða uppskotinum, sigur Magnus.

### Sjónligur íblástur

Og á steypinum sjálvum sæst eisini sjónliga, hvaðani íblásturin er komin. Basaltfláirnar í føroyska grótinum eru sjónligar í fótinum á steypinum, sum í aðrar mátar eisini hevur íblástur frá stóru drykkjusteypunum frá víkingaøldini.

Alt í alt tykist talan vera um eitt steyp, sum sum sømir seg einum meistara, og bæði hjá Fa. Eilif Arge og í FSF tykjast tey eisini vera væl nøgd um hetta. Somikið væl nøgd, at talan eftir øllum at døma verður um tíðindafund, tá steypurin verður sýndir almenninginum í komandi viku. Fram til tá mugu áhugað so taka til takkar við at kaga á heimasíðuna, www.clausbjerring.dk, har tað eisini ber ti at síggja handverkið.

Seinastu ferðirnar hevur tað mest sum verið fast, at Føroya Bjór hevur havt sítt navn á FM-steypinum, men tað er ikki víst, at tað eisini verður soleiðis hesaferð.

Í øllum førum sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, at tey enn ikki hava selt navnið á steypinum.

# Greiðar reglur fyri upptøku

**Bara tað at ein »komandi« umboðsmaður hevur áhugamál í einum felag, er nóg stór orsøk at nokta honum atgongd til upptøkuroyndina. Tí fekk FSF helst ikki handlað stórt øðrvísi enn tað sama, tá teir í vikuni noktaðu Ólavi Larsen úr Fuglafirði atgongd til upptøkuroyndina**

UMBOÐSMAÐUR
*Jákup Mørk*

Í vikuni kom fram, at ein ungur fuglfirðingur - Ólavur Larsen - ikki slapp ígjøgnum nálareygað, tá Fótbóltssamband Føroya skuldi gera av, hvørt hesin var egnaður til upptøkuroyndina sum leikaraumboðsmaður.

Orsøkin til hetta var fyrst og fremst, at Ólavur er ein av fjepparunum, sum hvørt mánakvøld siga sína hugsan um dystin hjá sínum felag í Dimmalætting. Ein teigur, sum Dimmalætting hevur innført í ár, og sum er skipaður soleiðis, at ein fjeppari úr hvørjum felag beint eftir dagsins dyst sendir eini SMS-boð til Dimmu, har hesin sigur sína hugsan um dystin, sum hann júst hevur verið vitni til.

Sambært aðalskrivaranum hjá FSF, Ísak Mikladal, hevur Ólavur í hesum havt nakrar útsagnir, sum ikki samsvara við ta tign, sum ein leikaraumboðsmaður helst skal hava, og tí er umsóknin um eina upptøkuroynd ikki gingin á møti.

### Subjektiv meting

Bæði í blað- og oddagrein í Dimmalætting verður funnist hvassliga at avgerðini hjá FSF. Blaðið sigur beinleiðis, at avgerðin hjá FSF ikki er røtt, og at hendan eigur at verða tikin upp til nýggja viðgerð.

Somuleiðis stendur Ólavur Larsen sjálvur sum eitt stórt spurnartekin, nú hann - fyribils í øllum førum - er forðaður í royndini at gera dreingjadreymin til veruleika.

- At skriva okkurt stuttligt og spískt eigur man at hava loyvi til, uttan at tað fær avleiðingar. Eg ætli mær heldur ikki at standa aftanfyri hinar fjeppararnar, sigur Ólavur Larsen við Dimmalætting.

Verður hugt at reglugerðini hjá FSF fyri umboðsmenn, so stendur tó greitt, at FSF í verandi støðu illa fær givið Ólavi Larsen møguleika at royna seg til upptøkuroyndina.

Partvíst, so er treytin fyri upptøku (grein 3.2, blðm.), at umsóknin kann vísast aftur, um umsøkjarin ikki hevur lýtaleysan atburð.

Hvat er lýtaleyst og ikki, vil altíð vera ein meting, sum verður gjørd í hvørjum føri sær, og í hesum førinum hevur FSF so ikki mett ÍF-fjepparan sum lýtaleysan. Tvørtur ímóti verður í avslagnum staðfest, at hann hevur verið til ampa fyri fótbóltin. Og tað er so ein meting, sum stendur við, hóast tað neyvan er øll, sum eru samd í hesum.

### Skal vera gegnigur

Hinvegin er ivin ikki serliga stórur, um hugt verður nærri at lógarverkinum fyri spælaraumboðsmenn. Í grein 3.4 stendur nevnliga, at »Umsøkjarin kann ikki hava starv, arbeiði ella áhugamál í FIFA, UEFA, Fótbóltssambandinum, í einum fótbóltsfelagi ella nøkrum felagsskapi ella bólki, ið hevur tilknýti til oman fyri nevndu bólkar.«

Og hetta krav er so heilt givið nakað, sum Ólavur Larsen ikki livir upp til í verandi støðu. Sum »almennur« ÍF-fjeppari kann illa sigast, at hann ikki hevur áhugamál í nøkrum felag. Og tí livir hann í løtuni ikki upp til strongu krøvini um gegni, sum lóggávan setir.

### Jákup einsamallur á norðurhøvum

Í týsdagsútgávu okkara skrivaðu vit, at sum tað ljóðaði, so vóru tað í øllum førum tríggir umsøkjarar, sum høvdu biðið um loyvi at standa royndina sum spælaraumboðsmaður.

Av FSF-skrivstovuni varð hóskvøldið staðfest, at tá tað kom til stykkis, var bara tann eini umboðsmaðurin, sum fór upp til próvtøku, og at hesin ikki stóð royndina.

Soleiðis er tað enn bara tann eini føroyski umboðsmaðurin á marknaðinum. Tað er Jákup í Stórustovu, sum seinnu árini hevur rikið virkið, North Atlantic Football Agency.